# Venjarin roknar við heiðursmerkjum

**Badminton**

Guðrun Jacobsen
Bjartur Lamhauge
Erland Poulsen
Rani í Líð
Aksel Poulsen
Guri Poulsen
Ingun Hansen
Ragnar Rasmussen





*Tað er serliga í kappingini fyri einstaklingar, at badmintonspælararnir kunnu gera vart við seg, heldur landsliðsvenjarin.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



**Føroyska liðið í badminton skal spæla ímóti gullvinnarunum av Guernsey í bólkaspælinum, og tí verður tað stór uppgáva at spæla seg víðari til heiðursmerkjadystirnar. Í einstaklingakappingunum eru møguleikar fyri heiðursmerkjum, heldur landsliðsvenjarin**

BADMINTON
*Eyðun Klakstein*

Føroyska liðið í badminton er endað í einum sera truplum bólki, har tey millum annað skulu spæla ímóti meistarunum av Guernsey.

– Men klára vit at vinna hendan bólkin, so kunnu vit eisini vinna alla kappingina, heldur venjarin, Aritra Nandy.

Hann hevur átta badmintonspælarar við sær til Guernsey, og tey skulu taka lut í bæði liðkapping og einstaklingakappingum.

– Tað er torført at vinna nakað heiðursmerki í liðkappingini, men eg havi stórar vónir til úrslitini í einstaklingakappingunum, sigur venjarin.

### Væntar sær góð úrslit

Bjartur Lamhauge og Erland Poulsen eru seedaðir millum átta teir bestu í einstaklingakappingina, og venjari teirra roknar eisini við, at teir kunnu fáa góð úrslit.

– Eg rokni við, at vit kunnu fáa onkrar spælarar í hálvfinaluna, og serliga í einstaklingakappingini hjá monnum er møguleiki at vinna heiðursmerki, heldur Aritra Nandy.

– Vit hava vant nógv, og vit hava allatíðina stíla eftir góðum úrslitum á Oyggjaleikunum. Hetta er ein spennandi avbjóðing fyri føroysku spælararnar, og á Oyggjaleikunum vita teir, at teir kunnu standa seg væl, heldur hann.

Føroyskir spælarar vóru við í HM fyri lið í Hollandi fyrr í ár, og har tapti liðið tveir tættar dystir fyri Surinam og Turkalandi.

– Tað var nakað heilt nýtt fyri okkara spælarar, men nú verða teir við í eini kapping, sum teir kenna. Teir vita, hvørji nógvir av mótstøðufólkunum eru, og teir vita, at tað ber til at vinna, sigur Aritra Nandy.

Sunnudagin og mánadagin er liðkappingin, og frá mikudegnum til fríggjadagin eru kappingar í einmansleiki.



# Teir spenna bogan høgt

**12 føroyskir bogaskjúttar fara at verða við í kappingunum á Guernsey. Hetta er størsta talið nakrantíð, og tey fara at liggja fram við eftir heiðursmerkjum**

BOGASKJÓTING
*Eyðun Klakstein*



*Bogaskjúttarnir plaga at roynast sera væl á Oyggjaleikunum*

Ongantíð áður hava so nógvir føroyskir bogaskjúttar verið við á Oyggjaleikunum sum hesaferð.

Heili 12 føroyskir skjúttar fara at bjóða av á Guernsey, og málið er at vinna fleiri heiðursmerki.

Bogaskjótikappingin verður skipað eitt sindur øðrvísi hesaferð, enn hon plagdi at vera.

Kappast verður í fýra dagar. Fyrsta dagin verður skotið 70 og 90 metrar fyri menn og 60 og 70 metrar fyri kvinnur. Næsta dagin skjóta øll 30 og 50 metrar.

Samlaða úrslitið fyri hesar innleiðandi kappingar verða so nýttar til bólking av einum finaluumfari fyri bæði einstaklingar og lið. Finaluumfarið verður avgreitt triðja og fjórða dagin, og tá fer øll skjóting fram á 70 metrum.

### Fleiri heiðursmerki

Broytingin í kappingarskipanin ger kappingina meira spennandi, og øll fáa eina størri avbjóðing. Hevur ein skjútti havt eina vánaliga byrjan, so kann hann koma afturíaftur, men tað krevst so sjálvandi, at hann vinnur á einum skjútta, sum hevur havt betri innleiðandi úrslit.

Í finaluumfarinum er skipanin tann, at teir skjúttar, sum tapa ein dyst, fara úr kappingini, meðan vinnararnir fara víðari.

Í ár verða heiðursmerki latin bæði í innleiðandi kappingunum og í finaluni, og tí kunnu liðini vinna tvey heiðursmerki og einstaklingar tað sama.

Føroyska recurveliðið er mannað við Annlot Rasmussen, Róa Johannesen, Hans Jørn Nielsen og Kristian Niclasen úr Tambar og Annika Vang og Rógvi Mohr úr Ørvi.

Compoundliðið er mannað við Sigrid Vang, Albertu Gaardlykke, Schandorff Vang, Per Holm Andersen, Jóannesi Poulsen og Anders Jønsson, øll úr Ørvi.

Leiðari og venjari er Schandorff Vang, og hjálparvenjari er Bjarni Rasmussen.

**Bogaskjóting**

Annlott Rasmussen
Rói Johannesen
Hans Jørn Nielsen
Kristian Niclasen
Annika Vang
Rógvi Mohr
Sigrid Vang
Alberta Gaardlykke
Schandorff Vang
Per Holm Andersen
Jóannes Poulsen
Anders Jönsson
Bjarni Rasmussen

# Gongdin skal vendast

**Frælsur ítróttur fór frá átta heiðursmerkjum og niður í tvey á seinastu Oyggjaleikunum. Nú skal úrslitið betrast, og alt annað enn trý heiðursmerki er ikki nóg gott**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Eyðun Klakstein*



*Fólkini í frælsa ítróttinum ætla at fáa betur úrslit hesaferð enn seinast. Alt annað enn minst trý heiðursmerki verður eitt vónbrot.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fólkini, sum eru við í frælsa ítróttinum, ætla sær at betra um úrslitið frá seinastu Oyggjaleikunum. Tá var tað eitt vónbrot, at talið á heiðursmerkjum fór úr átta og niður í tvey.

– Vit høvdu ikki marginalarnar við okkum. Vit høvdu fleiri fjórða pláss, og høvdu vit staðið okkum eitt vet betur í onkrum av hesum kappingum, so hevði tað knappliga givið fleiri heiðursmerki, sigur Niels Jákup Jakobsen, sum er leiðari fyri liðið í frælsum ítrótti.

Hesaferð fara fimm rennarar avstað, og harafturat eru trý fólk við, sum tveita við sleggju, klingru, kúlu og spjóti.

– Málið hjá okkum er at fáa eitt betri úrslit hesaferð enn fyri tveimum árum síðani, og tí verður alt annað enn trý heiðursmerki eitt vónbrot. Tað kunnu vit líka so væl viðurkenna. Eitt ordiliga gott úrslit hevði verið seks heiðursmerki, men trý høvdu verið gott, sigur Niels Jákup Jakobsen.

### Skaðar forða onkrum

Rigmor Napoleonsdóttir Arge og Borgarhjørt Holm luttaka báðar í 10.000 metrum og hálvum maraton, og her telja bæði einstaklinga úrslitini og felags úrslitini. Tær báðar manna eitt sterkt lið, sum kann fara at gera vart við seg.

Hjá monnum hava Hallur Holm og Guttorm Sørensen manna eitt gott lið í hálvum maraton, men hvørgin teirra er við í kappingunum hesaferð. Guttorm stríðist við at koma í gamla forminum eftir skurð í knænum, og Hallur Holm, sum hevur verið í sínum lívs formi, fekk ein skaða herfyri. Teir báðir hava meira enn einaferð vunnið heiðursmerki í liðkappingini, men hesaferð bjóða føroysku menninir seg ikki til á teimum longu teinunum.

Bogi Lenvig, sum bara hevur runnið í umleið tvey ár, hevur fyrireikað seg væl. Hann hevur vant í felagnum Sparta, sum heldur til í Keypmannahavn, og hann skal royna seg á 1500 metrum og 5 kilometrum. Síðani eru Evald við Garð og Heini Hátún við í kappingunum á teimum enn styttri teinunum.

Heri Ziska hevur vunnið fleiri heiðursmerki á Oyggjaleikum, og hann fer aftur hesaferð at liggja fram við. Randi Kúrberg og Ingibjørg Poulsen bjóða seg eisini fram í kappingunum, har tað ræður um at tveita langt.

**Frælsur ítróttur**

Evald við Garð, rennari
Heini Hanusarson Joensen, spjótkast
Heini Hátún, rennari
Bogi Lenvig, rennari
Ingibjørg Poulsen, kúluvarp og sleggja
Rigmor N. Arge, rennari
Borgarhjørt Holm, rennari
Randi Kúrberg, spjótkast
Heri Ziska, klingra og sleggja

# Kappast ímóti sær sjálvum

**Tað skal nógv til fyri at vinna heiðursmerki í triatlon, og tí fara føroysku luttakararnir fyrst og fremst at royna at fáa góðar persónligar tíðir**

TRIATLON
*Eyðun Klakstein*



*Í triatlon skulu luttakararnir bæði svimja, súkkla og renna. Teinurin er samanlagt omanfyri 50 kilometrar.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Triatlon er ein sera krevjandi ítróttargrein. Talan er um eitt bland av trimum ítróttargreinum, har tað verður kappast á longum teinum.

Tann olympiski teinurin fyri triatlon, sum eisini verður nýttur til Oyggjaleikirnar, er 1500 metrar svimjing, síðani 40 km. súkkling og at enda 10 km. renning.

Hetta krevur sín mann, men eisini kvinnur eru við í hesi ítróttargrein.

Føroyingar senda fýra mans og eina kvinnu avstað til Guernsey fyri at kappast í triatlon.

– Teir, sum vit kappast við, hava góðar umstøður at venja undir, og teir gera nógv við venjing og kappingar. Tí eru teir munandi betri enn vit, sigur Eyðtór Joensen, sum er ein av føroyskum triatloniðkarunum.

– Fyri okkum ræður um at fáa so góðar persónligar tíðir sum gjørligt. Vit koma kanska at liggja um tveir og ein hálvan tíma, meðan teir, sum vinna kappingina, vanliga liggja um tveir tímar.

### Ein kapping

Fyri tveimum árum síðani hevði Gunnar Dahl-Olsen eina góða tíð. Hann brúkti umleið 2 tímar og eitt korter um krevjandi teinin, og hetta hevði við sær eitt pláss sum nummar 16.

Hetta vísir, at talan er um eina sera harða og krevjandi kapping, har tað veruliga skal nakað eyka til fyri at kom fram á heiðursmerkjapláss.

Luttkararnir í triatlon hava eina kappingardag, og tað er sunnudagurin. Tá skulu stívliga 50 kilometrar leggjast aftur um við svimjing, súkkling og renning, og tað er einasti kjansurin at gera vart við seg.

**Triatlon**

Eyðtór J. Joensen
Beinir Rasmussen
Gudmundur Joensen
Elisabeth Johannesen
Kári Simonsen